# Ein útifrystur stríðshani

**Fyrst var hann ein politiskur outsidari. Men eftir átta mánaðir í Fíggjarmálaráðnum við nógvum buldri og braki bleiv hann fremsti atkvøðuslúkurin hjá Sambandinum. Men í dag er hann – við egnum orðum – útifrystur í flokkinum. Vit hyggja nærri at mest umstrídda landsstýrismanninum seinnu árini, Magna Laksáfoss**



## Politiskt portrett



**Heini í Skorini**
heini_skorini@yahoo.com

– Tað eru nógv tekin um, at fleiri ynskja meg út á eitt síðuspor í løtuni.

Orðini eigur ein 39 ára gamal sambandsmaður í einum horni á kaféini Hvonn í Vágsbotni í Havn. Hann sær ikki út sum nakar stríðshani. Fyrrverandi fíggjarmálaráðharrin við eyðkenda kóvboyslipsinum, sum frá mai 2007 og fram til løgtingsvalið í januar 2008 sat á stóru hornaskrivstovuni á ovastu hædd í Albert Hall.

### Útifrystur

Sum ein teymaleysur tarvur rann búskaparfrøðingurin í Sambandsflokkinum inn á politiska vígvøllin á sumri í 2007. Og sum heystið og veturin leið, var maðurin komin sær í opið stríð á fleiri hermótum. Javnaðarfólk og fólkafloksfólk skutu ótroyttiliga eftir Magna Laksáfoss, sum sambært teimum hevði destabiliserað ABC-skútuna. Øll Sandoyggin var á gosi, tí maðurin var ímóti famøsa undirsjóvartunlinum til Sandoynna. Føroya Fiskimannafelag rópti vei, tí maðurin vildi pilka við sjómannafrádráttin. Kommunusamskipan Føroya rópti saman við Tórshavnar Kommunu neyðarróp, tí maðurin vildi hava ein felags útreiðslukarm fyri land og kommunur fyri at tálma samlaðu útreiðslunum. Ein ætlan, sum sambært kommununum eisini snúði seg um at skerja teirra inntøkugrundarlag. Og vit kundu hildið á...

Tvey ár seinni stendur Magni Laksáfoss við rygginum ímóti múrinum. Hóast 979 atkvøður gjørdu hann til toppskjútta á lista B á løgtingsvalinum í januar 2008, so fekk Magni einki pláss í landsstýrinum, tá nýggj ABC samgonga varð skipað í september í fjør, eftir at CHE-farsan var farin í søguna. Meðan Kaj Leo Johannesen, Johan Dahl og Rósa Samuelsen mynda Sambandsflokkin í Tinganesi, mátti Magni taka til takkar við formanssessinum í Mentanarnevndini og limaskapi í Fíggjarnevndini.

> *– Tað eru nógv tekin um, at fleiri ynskja meg út á eitt síðuspor í løtuni*

Buldrið og brakið hevur eftir øllum at døma havt sín prís. Og Magni ásannar uttan at blunka, at í løtuni er hann trýstur til síðis av sínum egnu.

– Tað var natúrligt, at Sambandsflokkurin ikki fekk fíggjarmál, tá semja var um, at vit fóru eftir løgmanssessinum. Hesi strategi tók eg undir við. Men tað eru nógv tekin um, at fleiri ynskja meg út á eitt síðuspor í løtuni, sigur Magni Laksáfoss í dag.

### »Kvaj« Leo

Tað var annars ein brølari av teimum heilt komisku, sum slepti tarvinum leysum. Tann 10. mai í 2007 vórðu forsíðurnar ruddaðar. Stórtíðindi bórust um, at landið hevði mist fíggjarmálaráðharran Bárð Nielsen til føroyska oligarkin í Íslandi, Jákup á Dul Jacobsen, og hansara milliardaverkætlan við navninum Stóratjørn. Ein verkætlan, sum nú er tveitt á øskudungan.

Sambandsformaðurin Kaj Leo Johannesen bretti upp um ermar og boðaði beinanvegin frá, at hann sjálvur fór at stýra landsins finansum. Men ólukkutíð hevði Kaj Leo gloymt ta lítlu detaljuna, at borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, var næstur á listanum og nú fór at fáa sæti á tingi. Og tá Heðin stutt frammanundan var rýmdur úr flokkinum og vorðin partur av Javnaðarflokkinum, eftir at hann hevði lumpað Sambandið og Fólkaflokkin í býráðnum í Havn, sat Kaj Leo við skegginum í postkassanum.

Í neyðini var ein búskaparfrøðingur búsitandi í Hvalvík hálaður úr ermuni. Og formaðurin proklameraði í viðtalu við Dimmu, at »vit hava fingið fatur á einum tungvektara, sum kennir føroyska búskapin so væl sum nakar«.

### Ímóti skattalættanum

Frá fyrsta bríksli kom Magni í fokus. Fyri summi var hann eitt frískt og kærkomið lot í eini stirvnari samgongu, hvørs yvirornaða politiska prosjekt var trupult at fáa eyga á. Og fyri onnur var hann ein útfarandi og óstýriligur landsstýrismaður, sum ikki virdi samgonguskjalið, og sum ikki dugdi at rógva í takt.

> *– Eg undrist stórliga á, at Kaj Leo fór út og tók frástøðu frá mær*

Longu áðrenn hann bleiv landsstýrismaður, hevði Magni alment kritiserað partar av búskaparpolitikkinum hjá ABC, fyrst og fremst skattalættan, sum hann sjálvur hevði verið við til at mynda sum ráðgevi á heysti í 2003. Tí mátti hann í viðtalu við fjølmiðlarnar undirstrika, at hann virdi fyriliggjandi samgonguskjal.

Men avbjóðingin at balansera ímillum egnar sannføringar og eitt samgonguskjal, sum ikki heilt passaði inn í hugaheimin hjá Magna, bleiv ein rokmikil affera. Gandaorðið hjá Magna var frá byrjan at tálma ein ovurhitaðan búskap. Tí var óðamannaverk at fara í holt við ein sandoyartunnil. Tí skuldi skattalættin strikast. Tí skuldi sjómannafrádrátturin minkast. Og tí skuldi kommunubúskapurin regulerast.

– Tað stóð greitt í samgonguskjalinum, at vit skuldu føra ein konjunkturregulerandi politikk. Skattalættin var sniðgivin, tá búskapurin hevði brúk fyri honum, men veruleikin var ein heilt annar á heysti í 2007. Tí hevði eg fulla heimild til at arbeiða soleiðis, sum eg gjørdi, sigur Magni Laksáfoss í dag.

### Lukturin á bakarínum

Skjótt var eldur í ABC-skálanum, og kórið av bonskum útsagnum ímóti Laksáfoss úr egnum rekkjum vant uppá seg. Fyrst í juli er løgmaður í fjølmiðlunum og minnir Laksáfoss á, at nú er hann ikki bara búskaparfrøðingur longur, men eisini politikari. Men Laksáfoss heldur óræddur fram og skrivar eina umstrídda kronikk í Sosialin tann 8. august, har hann endurtekur sínar búskaparpolitisku visjónir.

Aftursvarið frá samgongufeløgum kemur prompte. Gerhard Lognberg ýlir sum ein skáldaður grísur. Anfinn Kallsberg eftirlýsir politiskt medvit. Óli Breckmann skuldsetur Magna fyri at niðurgera arbeiðið hjá Bárði Nielsen og fyri óbiðin at kleyra inn á málsøkir hjá øðrum landsstýrisfólkum. Og formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen, gevur Magna greið boð í Sosialinum.

– Um Laksáfoss ikki dámar luktin á bakarínum, skuldi hann bara havt sagt nei takk til hetta arbeiðið.

Men hví valdi Magni at arbeiða soleiðis, sum hann gjørdi? Og hvat fekk hann burturúr, annað enn politiskar fíggindar og eitt ringt umdømi millum teir flokkar,

### Fakta

Føddur í 1969. Giftur við Bodil Hentze Laksáfoss. Tvær døtur. Útbúgvin búskaparfrøðingur frá Københavns Universitet. Ph.D. lesandi á Roskilde Universitetscenter um føroyskan búskap. Hevur starvast á Hagstovu Føroya, Grønlands Statistik, grønlendskari KT-fyritøku og verið limur í Búskaparráðnum. Landsstýrismaður frá mai 2007 til januar 2008. Løgtingslimur síðani januar 2008. Limur í Fíggjarnevndini og formaður í Mentanarnevnd Løgtingsins.

Sosialurin